ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## Sethús og stórt grundøki Yviri við Strond 57

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 659 a, Tórshavn, seld.

Talan er um eina serstaka ogn, ið liggur ógvuliga væl fyri við fríum útsýni yvir fjørðin og Nólsoynna. Partur av grundøkinum er plantað við m.a. stórum trøum. Økið omanfyri húsini er bøur. Umframt sethúsini er á økinum hjallur og gamalt fjós við laðaðari grund.

Grundøkið er 3.057 m².

Húsini, sum eru bygd í 1956, eru í tveimum hæddum, hvør 136 m², alt innrættað. Í erva: Gangir, baðiverilsi, køkur, tvær stovur, hjúnarúm, og trý kømur. Í kømrum og gangi eru innbygd skáp. Kjallari: Gangir, stór stova, trý kømur, wc/brúsa, fýrrúm, vaskikjallari, kjallararúm og goymsla. Fleiri innbygd skáp eru í niðaru hæddini.

Prísuppskot: kr. 2.500.000,00

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**

## Rakstur av kantinuni í nýggja skúladeplinum í Suðuroy

Vit hava hugsað okkum, at kantinan verður rikin sum ein privat forrætning, og vilja gjarna hoyra frá áhugaðum, sum verða biðin um at venda sær skrivliga til okkara.

Kantinan verður innrættað við útgerð sum hoyrir til tann praktiska raksturin. Húsaleiga skal ikki gjaldast, og skúlin tekur sær av el og hita.

Tað verður møguleiki fyri eitt sindur av kiosk-virksemi, men vit leggja dent á, at næmingar og starvsfólk kunnu fáa heilsugóðan mat.

Vit eru áhugaði í at hoyra frá fólki, sum hava útbúgving innan økið, ella praktiskar royndir í rakstri av kantinu ella matstovu.

Tey, ið áður hava vent sær til okkara, verða biðin um at senda nýggja áheitan.

Freistin er 6. februar, og áheitanin skal sendast til:

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**
att. Ole V. Laursen, deildarleiðari
Vágsvegur 30
Postboks 130
900 Vágur

## Nes Sóknar Handverkarafelag

Ársaðalfundur felagsins verður í hølunum hjá Hæddini í Saltangará tann 05.02.2009, kl 19,-

**Nevndin**

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## Til sølu

Vegna Sp/F SD Beding í konkurs eru hesar ognir til sølu.

Ein bilur av merkinum Citroen C5, árgang 2003
Trukkur av slagnum KLMV 32-1200, árgangur 1984
Motorsúkkla, 125 kubik.

Bjóðast kann uppá lutirnar samlað ella hvør sær.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Advokatskrivstovuna, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, tlf. 353335, att: Aksel V. Johannesen, adv. mail: avj@jura.fo ella Anniku R. Olsen, mail aro@jura.fo.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 10 Fax: 37 12 53

## Heilsu- røktari/hjálpari

Vegna farloyvi verður søkt eftir heilsu- røktara/hjálpara til Ítrivstovuna í tíðini 1. mars 2009 til 28. februar 2010.

**Starvslýsing**
Í høvuðsheitum umfatar starvið at standa fyri dagliga arbeiðinum og leiðsluni í Ítrivstovuni, herundir aktivering av búfólkunum. Starvið hevur beinleiðis tilknýti til fyristøðukvinnuna.

Arbeiðstíðin er 0,9.

**Førleikakrøv**
Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur lokið prógv sum heilsu- røktari/hjálpari.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Almanna- og Heilsurøktarfelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 34 33 10 lokal 3315.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
att. Ronnié Midjord, umsjónarmaður
800 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

**Umsóknarfreist 11. februar 2009.**

## Grundstykki til sølu

Grundstykki í Tórshavn, 572 m², til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 316451 ella 516451**

Lesið Sosialin -so eru tit við!




## PHD-STUDENTUR

**FISKAALING P/F hevur fingið stuðul frá Granskingarráðnum til PhD-verkætlanina »Vatngóðska innan aling á sjónum«. Í hesum sambandi verður søkt eftir PhD-studenti til verkætlanina.**

**Verkætlan**
Í verkætlanini verða mátingar og numerisk model brúkt at greina ávirkanina frá nótum og fiski á vatngóðskuna innan aling á sjónum. Numeriska modeleringin fevnir m.a. um modelering av streymi ígjøgnum og kring alinótir á sjónum, meðan mátingarnar fara fram á sjónum kring eitt alibrúk í Føroyum. Tann PhD-lesandi kemur at arbeiða saman við royndum granskarum í Føroyum og Noregi.

**Ynskiligir førleikar til PhD-lesandi**
- góða universitetsútbúgving í náttúruvísindi ella verkfrøði, t.d. innan havfrøði, veskumekanikk, alivísind, evnafrøði, lívfrøði, alisfrøði og støddfrøði
- áhuga fyri aling og umhvørvi
- hegni til projektarbeiði, numeriska modelering, feltarbeiði og greinaskriving
- royndir við gransking og menning, góðan mál- og telduførleika

Meira fæst at vita um starvið frá Øystein Patursson, granskara, Ph.D, tlf.: 214787, oystein@fiskaaling.fo, Ingolf Joensen, stjóra, M.Sc., tlf.: 214747, ingolf@fiskaaling.fo, ella frá www.fiskaaling.fo.

**Umsókn**
Umsókn við ævisøgu (C.V.) og avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til: P/F Fiskaaling, Við Áir, Att.: Øystein Patursson, FO-430 Hvalvík. Umsóknarfreistin er 31. januar 2009.

FISKAALING PF. · VIÐ ÁIR · FO-430 HVALVÍK
WWW.FISKAALING.FO

**Vágs Kommuna**

## Frítíðarskúlin í Vági

Skúlabørn sum ynskja at ganga í frítíðarskúlan aftaná summarfrítíðina, kunnu melda seg til, innan tann 13. februar 2009, í Frítíðarskúlanum á tlf. 374036 ella 733047

**Vágs Kommuna**
**www.vagur.fo**



Les Sosialin so ert tú við